


Fýrakantaðu boksirnar eru útskiftar



Livandi hummarar svimja í einum karið



Gjørligt er at blanda sær salat sjálvur



Her kostaði alt 10 krónur




Mjólkarvørurnar hava fingið sína egnu deild

# Mikil Miklagarður

**Ljóst – breitt og væl lýst við skeltum. Ì morgum opnaði nýggji Miklagarður, og fitt av fólki var komið at forvitnast, hvussu handilin er broyttur**

HANDIL
*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Næstan øll niðara hædd av SMS er nú Miklagarður. Hornið, Fípan og bakarin eru partur av nýggja Miklagarði. Tað ger, at tá ein kemur inn í handilin, eru blómur tað fyrsta ein sær. Grønmeti, ið fyrr var við inngongina, er flutt longri inn í handilin.

Annars kennir ein seg aftur í Miklagarði, hóast nógv er broytt. Mjólkarvørðurnar hava fingið sín egna krók, ið eitur Mjólkargarður. Tær fýrakantaðu boksirnar eru skiftar út við rundar innbjóðandi diskar við viðskera.

Gjørligt er at keypa sær salat av 18 ymiskum sløgum, sum ein sjálvur velur. Livandi hummarar svimja runt í einum kari, og so er bara at velja sær ein sum skal í pottin.

Mitt inni í Miklagarði savnaðust beinavegin nógv fólk rundan um stórar kassar við øllum møguligum tingum. Tað er marknaður, har alt kostar 10 krónur.



Blómuhandilin Fípan er flutt inn í Miklagarð

### Størri DVD-deild

Deildin við DVD filmum og fløgum er fleiri ferðir størri enn fyrr. Nú kann eisini lurtast eftir tónleikinum, áðrenn keypt verður. Vælverudeildin hevur fingi egið navn "Persónligt", og verður óivað ein rættiligur kappingarneyti hjá Heilsu, ið liggur beint yvirav Miklagarði.

Kassarnir eru eisini fleiri enn fyrr – níggju ístaðin fyri sjey, og øll starvsfólkini eru í nýggjum bláum skjúrtum og litfagrum turrikløðum.

Tá ein hevur goldið fyri tað, ið keypt er inni í Miklagarði, kemur ein út til gamla Hornið og bakarin. Úrvalið av blandaðum bommum er nógv størri enn fyrr.

Nærmast Apotekinum er ein nýggj opna gjørd, har gjørligt er at keypa sær skundverða og ís.

## Hvussu dámar tær nýggja Miklagarð?



**Lynn Reveal:**
– Nógv er betri enn tað var fyrr. Breiðari og ljósari. Eg havi eitt sindur av skundi, so hjá mær var eitt sindur torført at finna tað, eg skuldi hava ídag.



**Dánial Petur Thomsen**
– Mær dámar væl. Tað er nógv størri enn fyrr, og nógv meiri at fáa



**Elsa Thomsen**
– Tað er meiri uppdeilt og tað dámar mær væl. Tað verður lættari at finna, tá ein hevur verið her nakrar ferðir.

APOTEKSVERK FØROYA

FARMAKONOMNÆMINGAR

Vit søkja eftir 4 næmingum at byrja 1. mai 2006 ella eftir nærri avtalu.

Eitt lærupláss á Suðuroyar Apoteki á Tvøroyri
Eitt læruplass á Eysturoyar Apoteki í Runavík
Tvey læruppláss á Tjaldurs Apoteki í Tórshavn

Ert tú áhugað/ur í apoteksarbeiði, kunnu vit bjóða tær eina spennandi og áhugaverda útbúgving.

Farmakonomútbúgvingin umfatar í stuttum:
At læra um heilsu, heilivág og viðgerð við heilivági, hvørji evni eru í heilivágstilbúningum, hvussu heilivágur virkar og skal handfarast.

At læra at arbeiða saman við nógvum starvsfólki, at arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir sambært galdandi lógum og kunngerðum.

At læra at geva kundum okkara góða tænastu og leiðbeining í samband við útflýggjan av apoteksvørum.

Útbúgvingin tekur 3 ár, og fer fram á tí apoteki, ið næmingurin er knýttur at.
Útbúgvingin er í samstarvi við Farmakonomskúlan í Hillerød.
Næmingurin skal í skúla í Hillerød 1-5 vikur í senn, íalt 7 ferðir í lærutíðini.
Próvtøka er á skúlanum á 2. og 3. ári.

Krøv til umsøkjaran:
Umframt Students-, HF-, HH-, HT- ella Fiskivinnuskúlaprógv, er tað av týðningi at tú hevur eitt opið sinni og hug at arbeiða við viðskiftafólki.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum verður at senda til Apoteksverkið, Postboks 3087, 110 Tórshavn áðrenn 18. apríl 2006.
Skriva 'umsókn' á brævbjálvan, og tilskila hvat apotek søkt verður á.

Meira fæst at vita um útbúgvingina á www.apotek.fo. ella við at ringja til:
Suðuroyar Apotek , tlf. 37 10 76, Fríði
Eysturoyar Apotek, tlf. 47 12 00, Hjalti
Tjaldurs Apotek, tlf. 34 11 00, Dora